# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein øðrvísi samgonga

Tað mundi koma óvart á tey flestu, tá samráðingarnar um at skipa samgongu millum nógv umrøddu ABC flokkarnar slitnaðu undan vikuskiftinum, og løgmaður fór undir sítt nýggja initiativ, samgongu millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldisflokkin og Miðflokkin.

Neyvan høvdu mong roknað við, at hesir tríggir flokkar, sum í so mongum hava verið ósamdir og ymiskir, bráddliga fóru undir samráðingar. Ikki minst tá hugsað verður um, at serstakliga Miðflokkurin hevur verið tann, ið bæði Javnaðarflokkur og Tjóðveldisflokkur hava verið mest ósamdir við. Somuleiðis hava hesir báðir flokkar ella umboð fyri teir ikki verið júst tey best lýddu í Miðflokkinum. Kortini hevur tað so víst seg, at hesir flokkar eftir øllum at døma hava givið hvør øðrum lyfti um at fara undir eina semjusøkjandi samráðing.

Sambart formonnunum í Sambandsflokkinum og Fólkaflokkinum skuldi ikki verið nøkur grundleggjandi orsøk til hjá løgmanni at slíta samráðingarnar við teir. Hinvegin skilst, at kravboðini ella rættiliga tungtvigandi útspælið frá nýggja Laksáfossvonginum í Sambandsflokkinum um ein búskapargrunn, er tað, sum hevur fingið løgmann at slíta. Hví hann í sama viðfangi eisini kappar við Fólkaflokkin er eitt sindur torførari at skilja, tí sami løgmaður so oftani hevur víst á, hvussu gott samstarvið nettupp hevur verið við Fólkaflokkin. Tað er tó heldur eingin loyna, at tað eru kreftir í Javnaðarflokki, sum ikki vilja halda fram við Fólkaflokki. Tíðin vil so vísa, hvussu skilagott tað var av løgmanni at tveita A og B á dyr í senn, og um henda avgerð kann koma honum aftur um brekku, um ikki nýggja initiativ hansara við H og E ber ávøkstur.

Eftir okkara tykki spælir løgmaður sera høgt spæl, tá hann fer eftir eini so minimalari samgongu, har øll tingfólkini eru tungan á vágskálini, og ikki minst tá vit vita, at tað í hesum trimum flokkum eru tingfólk, sum ikki júst bera orð fyri at vilja leggja síni hjartamál á hillina. Ein breið samgonga vil altíð vera betri borgan fyri arbeiðsfriði og trygd, og tí skilja vit ikki tey, ið tvíhalda um, at betri er við smølum samgongum, tí tá kann eingin koyra fríspæl. Er tað ikki nettupp tann vandin, ið alla tíðina lúrir!

Tað er ongantíð rætt í politikki at læsa seg fastan og tvíhalda um, at alt skal vera sum tað var. Nýggjar tíðir hava við sær nýggjar avbjóðingar. Tað er greitt, at ein CEH samgonga fer at ganga longur á sjálvstýrisleið enn ABC. At hon eisini fer at reka annan politikk á búskaparøkinum enn ABC. At hon fer at hella meira til vinstru enn ABC. Uttan at skula koldøma nakað uppá forhond sum ómøguligt, fyrr enn tað hevur roynt seg, so verður tó spennandi at fylgja við, hvussu mongu individualistarnir í hesum flokkum fara at duga samgongudisiplin, tá avtornar. Ikki minst tað verður avgerandi fyri lagnuna hjá CEH.

**Sosialurin**

## Nýggjur barnaskúli á Sandi

**ANJA SANDOY**

Forkvinna í Sands Skúlastýri

Eftir meira enn eina øld við einum gomlum barnaskúla heima á Sandi (hann er frá 1884), sær tað nú loksins út til, at sandsbørn fáa ein nýggjan barnaskúla. Nýggi skúlin verður í skrivandi løtu smíðaður norðuri á Signabø. Hann verður smíðaður í elementum, og ætlanin er, at hann skal setast upp einaferð í summar á Eginsmerkrum á Sandi. Ætlanin er, at skúlin skal verða klárur at flyta inn í einaferð í desember í ár. Skúlin verður bygdur til eini 80 børn, og har verða seks stórar skúlastovur inni umframt serstovur, skrivstovur, wc´ir og verkstøð. Tað ber eisini til at hava forskúla í nýggja skúlanum, um tað skuldi verið tørvur á tí. Møguleikarnar í nýggja skúlanum eru nógvir, og tað verður spennandi at síggja, hvat kemur burtur úr.

Á Eginsmerkrum eru sera góðar umstøður til ein skúla. Har er ein spildurnýggjur FIFA-vøllur, har er gott útsýni í nærum allar ættir, sandurin og Mølheyggjarnar eru tætt við, og Sandafløtturin liggur sum ein opin oasa beint uttanfyri dyrnar. Eitt betri stað til ein barnaskúla, finnur tú ikki.

Tað má sigast, at bæði børn og lærarar, ið eru knýtt at Sands skúla, hava verið sera tolin, ja sjáldsama tolin. Gamli skúlin er lítil, hann er sera slitin, hann lekur her og der, har eru alt ov fá hølir og umstøðurnar annars eru sera ringar. Men ikki kann sigast, at trivnaðurin hjá børnum og lærarum hevur verið hareftir. Har arbeiða, sum nú er, 6 lærarar/vikarar. Teirra køkur, skrivstova, pausurúm, goymslurúm og kopirúm eri ein lítil, gamalur køkur, ið tey øll deilast um. Í húsinum er eitt lítið wc, ið bæði børn og lærarar eisini deilast um. Bókasavnið er so lítið, at har kunnu bara verða 4 børn inni í senn. Og so víðari. Men hesir lærarar duga sera væl at arbeiða eftir umstøðunum, tað er víst. Og eisini hava tey duga so sera væl at fáa børnini at trívast.

Tað sigst, at smáu skúlarnir húsa teimum býttastu børnunum. Hetta vil onkur vera við, sigur Óli Jákup Joensen, lærari, í grein í Skúlablaðnum stutt fyri jól. Men hetta eru óivað bara gitingar, tí tað finnast ongi hagtøl og ongar royndir, ið kunnu ávísa hesum gitingum. Tað má eisini verða rúm fyri smáu skúlunum, tí okkara samfelag er soleiðis hættað, at nakrar bygdir eru ikki so lætt atkomuligar. Smátt er eisini gott. Og hvør sigur, hvør besti karmur er um ein skúla júst í Føroyum? Hvar finna vit svarið uppá hetta??

## Bara Gerhard fær sítt hol

**HILMAR SIMONSEN**



Góðu landsmenn, hví eru tit so óðir um, at Gerhard fær eitt hol? Hvat ger tað, um vit spendera eina lítla milliard (kanska eitt sindur meir, tá av tornar) upp á at gera Gerhard glaðan? Býtt javnt út á hvønn føroying er tann gávan ikki nógv størri enn 21.000 krónur pr. høvd (pluss nakrar rentur næstu 30 árini). Hvat ger tað, um vit kunnu gera Gerhard glaðan, hann er so fittur og gudrøkin.

Um ráð ikki verður til eitt ordiligt skúlaverk, miðnámsskúla og universitet, hevur tað so nakað at siga; kunnu føroyingar ikki fara til Danmarkar í skúla? Føroyingar hava tikið hægri lestur í Danmark í mannaminnir, og hetta kann gott strekkjast til eisini at umfata miðnámsskúlanæmingar – og í ringasta føri eisini fólkaskúlanæmingar.

Tú skalt minnast til, at tað sum umræður er, at Gerhard fær sítt hol og størri javnvág millum Skopunarleiðina og tað, hann hevur millum oyrini.

Verður Sandoyartunnilin útsettur, til Gamlarætt og Teistin hava tænt fyri sítt breyð, so steðga vit einum tí størsta rossahandli, sum er framdur á Føroya Løgtingi. Tað vildi verið óføroyskt.

Og hvat skulu vit við einum búskapar- vælferðargrunni, sum kann hjálpa okkum á sjálvstýrisleið og byrgja upp fyri verri tíðum? Nær hevur tað verið føroyskt at hugsað langsiktað, um ein má spyrja? Fáa vit trupulleikar við eitt nú eldraútreiðslum um eini 10 ár, so taka vit málið upp, tá trupulleikin er komin – ikki fyrr! So ringt kann tað ikki vera.

Bilar tað nakað at vit hava gott og væl eina milliard í handilsjavnahalli? Vit kunnu taka lán úr útlandinum, um pengar mangla í landshúsarhaldinum. Tað hava vit prøvað fyrr, og tað gekk fínt, burtursæð frá at 10% av øllum føroyingum, skuldarbundnir, máttu flýggja um háls og herðar í onnur lond at byrja eina nýggja tilveru. Men fær Gerhard sítt hol, hevur slíkt einki at siga.

Og fer peningur at mangla í til at gjalda Sandoyartunnil, yvirtøkur, skúlar, universitet o.a., so ber tað væl til at loysa. Til dømis skrúva skattin upp á 85%. Tað er góður javnaðarpolitikkur, sjannheit Jóannes? Samfelagið kemur so ikki út í eina kreppu aftur, tí vit hava lært av feilunum í 80-unum!

Gerhard skal hava eitt hol í stundini. Gerhard er ikki øðrvísi enn aðrir menn, sum dáma væl hol.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.